# Minningarorð um Tórálv Stenberg




Vit sum foreldur og dreingir okkara vilja minnast og takka Tórálvi fyri hansara megnar avrik sum venjari.

Tórálvur hevur gjørt eitt gott arbeiði innan Argja Bóltfelag, og alíkavæl hevði hann tíð til at venja dreingirnar frá tí teir vóru 6 og 8 ára gamlir, til hann nú vegna sjúku mátti gevast.

Hesir dreingir blivu Føroyameistarir í 1999 og vóru teir fyrstu í AB, sum komu í unglingadeildina og skrivaðu sáttmála við AB í 2005, og tá vóru teir 15 og 16 ára gamlir.

Frá 1995 til 2006 hevur Tórálvur vant hetta sama lið við stórum nærlagni og áhuga, sum avgjørt hevur komið okkara dreingjum og foreldrum tilgóðar. Ikki at gloyma Haldis, sum altíð hevur verið trúgv og staðið við teirra lið, sum ein mamma fyri allar dreingirnar.

Vit hava mist ein góðan formann, venjara og vin.

Saknurin er stórur hjá okkum og ikki minst hjá Haldis, Fróða, Jónas og Heðin.

Má Harrin styrkja tykkum í tíðini sum kemur.

**Dreingir og foreldur**

# Gullbrúðarparið Sigmar og Emma

Fríggjadagin 8. desember 2006 hava hjúnini Emma og Sigmar Johannesen í Havn gullbrúdleyp. Tey vórðu vígd av Akseli Tórgarð, presti, í táverandi heimi hansara uppi á Torgarði, nærhendis Tinghúsvegnum.

Í hesum umhvørvi vaks eisini Emma upp. Hon var elst av trimum systkjum, foreldur hennara vóru Niels Johannes og Birha Viderø av Viðareiði. Lívið hjá Emmu var ikki altíð so lætt, orsøkin var, at hon hevði ikki veik bein; men Emma hevði góðar handaligar gávur og dugdi bæði væl at binda og ikki minst at tekna.

Eftir lokið realprógv fór Emma í læru á sakføraskrivstovuni hjá Leif Wagestein. Eftir at hon hevði fingið prógv, hendir tað, at hon hittir Sigmar Johannesen frá Norðskála. Foreldur hansara vóru Elsa, f. Joensen, frá Norðskála, og Johannes Johannesen úr Tjørnuvík.

Emma og Sigmar hava óiva verið sera forelskaði, tí árið eftir fór Emma við honum yvir til Ìslands, har Sigmar um hetta mundi sigldi við trolara, ið kallaðist Juni.

Ìmeðan arbeiddi Emma á einum katólskum sjúkrahúsi, har var hon so væl dámd, at nonnurnar vildu, at hon skuldi gerast ein teirra. Men Emma hevði aðrar ætlanir, árið eftir fór hon



niður til Danmarkar, har hon starvaðist á Skodsborg baðisanatorium í umleið tvey ár.

Eitt ár seinni avgjørdu Emma og Sigmar at koma heim aftur á klettarnar. Tey komu at búleikast í Havnini og keyptu sær grunddøki frá foreldrinum hjá Emmu í vakra umvørvinum nærhendis viðalundini. Emma fór í starv á býráðnum, har hon starvaðist í mong ár, eitt nú sum skrivari hjá býararkitektinum Gunnari Hoydal. Sigmar keypti sær ein kranabil og var mong ár sjálvstøðugur vinnurekandi og hevði eitt langt tíðskeið sáttmála við byggifelagið E. Phil & Søn.

Heimið hjá teimum hevur altíð verið nógv vitjað, og vanligt var, at fólk vórðu búgvandi har í fleiri vikur, eitt nú tá ið Brøðrasamkoman hevði samfelagsmøtir, kom familjan á Viðareiði ofta at gista, og var hetta sera hugnaligt. Ein persónur sum ein ikki sleppur undan at nevna er Birtha, móður Emmu, sum var ein hollur stuðul í familjuni bæði andaliga og verðsliga. Emma og Sigmar høvdu eisini sín leiklut í sunnudagsskúlanum hjá adventistunum, har Emma dugdi avbera væl at siga frá søgum, og Sigmar skipaði fyri útferðum til Leynavatn.

Sigmar og Emma fingu bert eittans barnið, Birgir, sum er giftur við polskari konu, ið eitur Agnieszka. Ofta verður sagt, at barnabørnini eru lívsins dessert, og tað sikkurt nakað um tað tí. Tvey sera fitt barnabørn eru við til at ríka dagligdagin hjá Emmu og Sigmar.

Vit ynskja tykkum Guds ríkligu signing framyvir og vilja takka tykkum fyri allan tann kærleika tit hava givið og lært okkum við lívi tykkara.

**Kærastu heilsanir
Agnieszka, Birgir,
Emma og David**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Tórhallur Hansen, Norðragøta**, andaðist í morgun á Ríkissjúkahúsinum, 74 ára gamal. Kistan kemur í Vágar við flogfari fríggjadagin kl. 13:45. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Christoffer Joensen, ættaður úr Sandvík, búsitandi í Vági**, andaðist sunnukvøldið á Suðuroyar sjúkrahúsi, 81 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verðu úr Vágs kirkju leygardagin kl. 13.

**Adelaida Olsen, vanliga nevnd Adelaida á Reyðhúsi**, andaðist mikumorgunin á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Kistan fer frá kapellinum leygarkvøldið kl. 20 heim í Christians kirkjuna. Jarðarferðin verður úr Christians kirkjuni sunnudagin kl. 13.30.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum, sum á ymiskan hátt mintust meg á 80 ára degnum.

**Heilsan
Inga Beder**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á einhvønn hátt gjørdu 75 ára føðingardagin 20. okt. 2006 ógloymandi, takki eg hjartaliga.
Takk fyri gávur, kort, uppringingar og tøkk til tykkum, sum komu inn á gólvið.
Harrans signing, við ynskjum um gleðilig jól og gott nýggjár.

**Kristina Poulsen, Hvalba**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæra mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

**Adelaida Olsen**

Á Reyðhúsi
Klaksvík

andaðist mikudagin 6. des. á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Kistan fer úr Kapellinum leygardagin
kl. 20 heim í kirkjuna.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni
sunnudagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Ragnar, Arne og Malan**

Tey, ið vilja minnast Adalaidu, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Leguhúsið í Nesvík.